## Bornholmarar eta grønlendskt

Nú skulu fólk á Bornholm venja seg við at eta mat úr Grønlandi. Søren Vestergaard Mikkelsen, sum býr í Nexø á Bornholm, hevur búð í Grønlandi í flairi ár, og hann hevur nú sett sær fyri at fáa bornholmarar at eta grønlendskt, og at grønlendingar skulu eta ymiskt av Bornholm. Millum annað ætlar hann at selja pylsur, kryddurtir og súltutoy úr Grønlandi á Bornholm, og hinvegin ætlar hann at senda roykta sild, sinnop og sjokolátu av Bornholm til Grønlands.

## Norðoya Javnaðarfelag aðalfund

Hósdagin tann 5 mars kl.19.30 hevur Norðoya Javnaðarfelag aðalfund í Bøgøtu 3. Í nevndini sita Signhild Joensen Trøllanes, forkvinna, Tummas Lervig Klaksvík næstformaður, Jóannes Johannesen Klaksvík, kassameistari, Eyðgunn Samuelsen Klaksvík, skrivari og Dora Joensen Húsar, nevndarlimur. Á aðalfundinum er val av nevnd á skránni og standa Eyðgunn Samuelsen og Jóannes Johannesen fyri valið. A fundinum er eisini ætlanin at viðgerða uppskot til eftirlønarskipan, har ting- og landstýrisumboð luttaka.

## Kreppufundur um almannamál í lítlu samgongu

Lítla samgonga fundaðist um almannaøkið allan fríggjadagin. Arbeitt verður víðari við málinum hesa vikuna.

Fríggjadagin skrivaðu vit, at Javnaðarflokkurin skuldi havt hótt við at slíta samgonguna, um ikki játtanin til almannaøkið varð hækkað. Fríggjadagin sendi flokkurin út tíðindaskriv, sum hann rópti "Konstruktivir fundir um almannaøkið".

Har varð sagt, at samgongan hevur sitið á konstruktivum fundum um neyðugar tillagingar, so sleppast kann undan, at sparingar raka tey veikastu í samfelagnum.

Eisini váttar flokkurin, at hann bað um, at skráin á regluliga fríggjadagsfundinum í lítlu samgongu varð ruddað, til frama fyri mál, sum eftir floksins tykki raka skeivt, og tí ikki eiga at verða gjøgnumførd.

- Hetta hava vit viðgjørt leypandi í tingbólkinum alla vikuna – eisini saman við landsstýriskvinnuni á økinum. Og vikan endaði sum sagt við einum fundi í lítlu samgongu, har tað ikki er komið á mál enn.

- Men tað er greitt, at flokkarnir hava eina felags fatan av, hvørjir trupulleikarnir eru, ið krevja loysnir sum skjótast, sigur flokkurin.

Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum, rósti annars Rósu Samuelsen í Kringvarpinum, fyri at hava sett loysnir í verk á økinum børn og ung. Men hann ásannaði, at ikki øll í samgonguni eru so glað. Tí segði Jørgen Niclasen, at samgongan væntandi fer at loysa trupulleikarnar, men at tær í sofall skulu vera útreiðsluneutralar á fíggjarlógini. Tí má peningurin finnast á øðrum kontum.

rd

# Fíggarlógin, eitt verri upptak

**Fríggjadagin gav samgongan mentanarøkinum kunstigan andradrátt, og í hesari vikuni verða trupulleikarnir á almannaøkinum helst loystir, sigur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri**

FÍGGJARPOLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

- Vit eru komin í hesa støðuna, tí Fíggjarnevndin hjá Løgtinginum gjørdi nakrar fatalar broytingar og faktuellar feilir í fíggjarlógaruppskotið, beint áðrenn tað varð samtykt, sigur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, um óskilið, sum flokkur hansara nú er vaknaður upp til, eitt nú á økinum børn og ung. Men eisini innan skúla, gransking og pensionistaøki hevur fingið av at vita seinastu vikurnar.

- Vit noyðast snøgt sagt at fara inn og hyggja upp á hetta, so vit ikki sorla alt sundir, sigur Jóannes Eidesgaard við Sosialin.

Leygardagin boðaði Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, frá, at samgongan er komin eitt stig nærri eini loysn, eftir at Javnaðarflokkurin kravdi vanligu skránna strikaða á regluliga fríggjadagsfundinum hjá lítlu samgongu, til frama fyri skerjingarnar á almannaøkinum.

Eisini segði formaður Fólkafloksins, at loysnirnar, sum tey koma fram til, skulu vera útreiðsluneutralar á fíggjarlógini. Men tað er ikki bara Fólkaflokkurin, sum vil hava útreiðsluneutralar loysnir.

- Tað vilja allir flokkar í samgonguni, sigur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, við Sosialin.

- Tað kemur ikki upp á tal at økja um hallið á fíggjarlógini. Heldur ikki hjá Javnaðarflokkinum. Tí mugu loysnirnar finnast innan fyri tey einstøku ráðini, sigur Jóannes Eidesgaard, sum tó er sannførdur um, at samgongan finnur eina loysn á almannaøkinum komandi dagarnar.

Í tilgongdini er ætlanin at fara eftir øllum ráðunum og at leggja tey undir luppin, eitt í senn, og síðani at gera partssemjur sohvørt, so landsstýrisfólkini kunnu bera lógaruppskot, sum krevjast fyri at halda játtanunum, niðan í tingið.

### Setrið bjargað

Higartil er samgongan komin ásamt um, hvussu Mentamálaráðið kann koma upp undan aftur, uttan at heili øki fara í sor. Her vísir Jóannes Eidesgaard eitt nú til trupulleikarnir við Granskingarráðnum og Fróðskaparsetrinum.

- Nú hava vit avgreitt mentamál, við at finna loysnir innan fyri ráðið sjálvt. Næsta avbjóðing er so at finna loysnir á almannaøkinum, so vit sleppa undan at fara so harðliga fram móti teimum veikastu, sigur Jóannes Eidesgaard.

- Eg veit væl, at tað er ein truplari uppgáva at finna pening innan almannaøkið, tí tað er nógv dýrari, sigur Jóannes Eidesgaard. Men hann væntar tó, at tey fara at koma fram til eina felags semju, sum bøtir um korini hjá teimum veikastu, sum verða rakt í hesum døgum.

Spurdur, hvussu tað kennist sum javnaðarmaður at skula spara so nógv á almannaøkinum, sigur Jóannes Eidesgaard, at hann metir hetta ikki vera eina sparirundu sum so.

- Í løtuni royna vit at minimera avleiðingarnar av einari fíggjarlóg, sum varð broytt til ókenniligheit, tá Fíggjarnevndin hevði havt fingrarnar í henni, sigur Jóannes Eidesgaard, og sipar til beinleiðis faktuellir feilir og sparingar, sum í praksis eru ógjørligar at gjøgnumføra.

### Óheppin tilgongd

Men tit í samgonguni eiga formannin og meirilutan í Fíggjarnevndini. Er tað so ikki samgongan sjálv, sum hevur ábyrgdina av óskilinum?

- Fíggjarlógartilgongin var á nógvan hátt óheppin. Tað, sum landsstýrisfólkini komu við, bleiv í fleiri førum feiað av borðinum í Fíggjarnevndini. Og seinastu dagarnar áðrenn samtyktina, høvdu vit ikki atgongd til uppskotið meira. Men kanska eg átti at tosað meira við landsstýrisfólkini áðrenn. Tað kann væl vera, sigur Jóannes Eidesgaard, sum ikki heldur seg kunna ábyrgdast fyri arbeiðsháttin hjá Fíggjarnevndini.

- Men tað er ongin ivi um, at samstarvið millum Landsstýrið og Fíggjarnevndina eigur at byggja upp á nøkur onnur prinsipp framyvir, so hetta skal rættast upp, sigur hann, og lovar, at næsta ár verður øðrvísi.

Her greiðir hann frá at eitt aðalorðaskifti um føroyska búskapin verður í tinginum næsta ár, og at hann er á veg við einari nýggjari játtanarlóg. Hendan skal gera, at framyvir skal tingið bert taka støðu til eina samlaða játtan til hvørt ráðið sær, og at tað so verður upp til einstaka ráðið at býta játtanina út á stovnarnar.

- Hetta er fyri, at tey, sum hava skil fyri økjunum, sleppa at fordeila pengarnar, og at alt verður ikki latið upp til tilvildina í tinginum, sigur hann.




*Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, fílist á, at Tað er ov lítið skil á føroysku fíggjar- og búskaparstýringini. Tí mugu vit heldur fyrireika okkum upp á umfatandi broytingar komandi árini. Eitt nú, at almennar stuðulsskipanir eru ikki náttúrulógir, og at veitingar frá tí almenna verða inntøkutreytaðar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*